

# Norðsjógvurin góður fyri danska statskassan

**Jan Müller**

08.06.2014 - 13:55

Oljan.fo

Norðsjóvargrunnurin royndist tí danska ríkiskassanum væl í fjør. Sambært roknskapinum fyri 2013, sum júst er lagdur fram, fekk ríkiskassin 6,9 milliardir krómur úr grunninum í fjør. Av hesum komu 3,6 milliardir frá skatti og 3,3 milliardir frá útbýti.

Árið royndist sostatt munandi betri enn 2012, tá tað almenna fekk tvær milliardir krónur úr grunninum, sum eftir reglunum eigur 20 prosent av øllum olju- og gassloyvum í Norðsjónum.

Orsøkin til tann stóra munin frá 2012 til 2013 komst av, at í 2012 fekk Norðsjóvargrunnurin 20 prosent av Dansk Undergrunds Consortium, sum situr á millum 85 og 90 prosentum av olju- og gassvirkseminum í tí danska partinum av Norðsjónum.

Hetta sást av álvara aftur í roknskapinum í 2013.